Kaldbaks skúli
Krossgøta 13
180 Kaldbak
Tlf. 519800 og 302520
Teldubústaður: magnus.kroki@skulin.fo



# Kaldbaks skúla søkir námsfrøðing

**Hetta starvið verður lýst leyst at søkja frá 1. August 2025 í Kaldbaks skúla**

- Starv sum námsfrøðingur í forskúla, umframt tímar sum námsfrøðiligur stuðul í skúlanum. Setanarbrotið liggur millum 0,72 og 0,82. Endaliga setanarbrotið verður ásett 1. Septembur 2025.

**Um skúlan:**
Kaldbaks skúli er ein lítil perla í stórari menning í sera vakrari náttúru, og tað er stutt frá haga og fjøru. Vit hava dugnalig starvsfólk og stuðlandi foreldur. Komandi skúlaár verða vit 29 næmingar frá 1. til og við 6. flokk, umframt 3 børn, sum eru innskrivaði í forskúlan. Forskúlin letur upp hvønn morgun kl. 7.30. Haraftrat samstarvar skúlin við Velbastaðar skúla og Nólsoyar skúla. Samstarvið er bæði millum lærararnar, men eisini á ávísum økjum millum næmingarnar – eitt nú við føroyskum dansi, renni- og ítróttardegi.

**Hvør ert tú?**
Tú hevur hug at arbeiða í einum lítlum, men mennandi læriumhvørvi. Tú dugir væl at samstarva og dugir at skapa trivnað. Tú hevur hug at vera við til at menna skúlan og brúka nærumhvørvið í undirvísingini. Eisini ert tú positiv/ur av lyndi.

**Starvið** verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Barnaváttan verður kravd í samband við setanina.

**Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. mai 2025 kl. 12.00.**

Umsóknin verður stílað til: Magnus í Króki, skúlastjóra á magnus.kroki@skulin.fo viðmerk ´starv`.
Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Magnus á tlf. 519800.